# Eysturoyar dansifelag 40 ár.

*Lag : Oljutátturin.............*

Tit gevið mær ljóð
í kvøld vit her sita í gildi so fró
í fýrati ár hava treðið tann dans
í dag kunnu siga, er vaksin til mans.
Av hjarta tann kvøða skal ljóða til øll:
“Vælkomin í høll”.

Tær kempur í tal
sum kvæðini mong hava skipað so væl
ja kvinnur og menn, ið her tóku tað stig
at verja og menna tann føroyska sið
í kvøld vilja minnast – tó orð ikki røkk –
við virðing og tøkk.

Tey kvæðini mong
so væl hava ljóðað her kvøldini long
um Løvuna norsku, um Sigmund og Trónd
um risar so sterkar og trøllini ónd
um brúdleyp og deyða, um gleði og sorg
um kongar í borg.

Og túrar í lond
har frændir vit hittu og knýtt vóru bond
um havið við Norrønu fóru í fjør
har blíðskap vit nutu á norskari jørð
í Japan skjótt trína í sjónvarpi reyst
í búna so *treyst.*

Og nevndin í dag
vit sanna at ongin fær meira í lag
hjá formanni haruball hildu í heyst
har skeinkjarin hugnar og reypar sum mest
og skrivarin orðnar: “Fær onkur og keyp
oss Brøndum í steyp”.

Vit hevja nú skál
og byrja skjótt dansin við lív og við sál
Gud gævi at framtíðin okkum gerst ljós
tey komandi fýrati røtt verður kós
til gaman og álvara verið øll klár
hvørt einasta ár.

Leivur Sørensen, nov. 2009